ARBEIÐSMARKNAÐUR · Helgi Jacobsen

# Milliónir kunnu sparast og arbeiðs-orkan økjast

Samfelagið missir milliónir av krónum, tí tey røttu fólkini sita ikki í teimum røttu stólunum. Somuleiðis missa fyritøkur milliónir í framleiðsluni tí at leiðslurnar ikki eru rætt samansettar. Nógv kann vinnast við at flyta fólk til høgru ella vinstru ella kanska hægri upp í bygnaðinum. Tað snýr seg um at finna rætta profilin ella motivasjónina. At gera eina lýsing av, um ein persónur er egnaður til júst hetta ella hatta starvið. Og tað snýr seg ikki minst um heilsu. Nógvar kanningar vísa, at sjúkrafrávera stavar frá, at fólk ikki trívast í sínum arbeiði.



MYNDIR: Helgi Jacobsen

Finn-Roger Nikolaisen sigur, at útbúgving ásetur, um tú ert kvalifiseraður til eitt starv, men at viðføddu evnini siga, um tú hóskar til starvið.

Vit hoyra onkuntíð fótbóltsspælarar ella tónleikarar siga, at lukkan í lívinum hjá teimum er, at teir gera akkurát tað, sum teir hava hug til. Teirra hobby er teirra professionella starv. Teir keða seg ongantíð og teir vinna pengar at gera sum teimum lystir.

Tað ljóðar tí kanska ov einfalt, tá umboðsmaðurin hjá Profiles International í Norra, Finn-Roger Nikolaisen, sigur, at fyri tey flestu menniskjuni ber tað til við eini test at lesa av, hvat arbeiði fólk duga best og hvar tey trívast best.

Kanska er KT-leiðarin í fyritøkuni nógv betur seljari, enn núverandi seljarin. Og øvut. Kanska er Jens als ikki egnaður at vera lærari. Kanska skuldi hann verið bókavørður ella verkætlanarleiðari á Fiskirannsóknarstovuni.

Í øllum førum tvíheldur Finn-Roger Nikolaisen um, at ein test við 314 spurningum kann geva okkum svar upp á, hvørjar eginleikar vit hava. Hvussu motiverað vit eru at gera ávís arbeiði. Testin avdúkar eisini, hvussu sterkur ein persónur er at átaka sær eina ávísa uppgávu í fyritøkuni ella á almenna stovninum.

Hóast ikki serliga vælegnaður og motiveraður situr hann har framvegis á tjúgunda ári, stongdur og gráur og gleðir seg hvønn dag at klokkan gerst fýra.

### 50.000 KUNDAR

Profiles International byrjaði sítt virksemi í USA í 1991 og hevur nú staðsett seg í 118 londum. Málið var og er at vera ein alheims fyritøka og í dag hevur fyritøkan 50.000 kundar. Úr rúgvuni av kendum fyritøkum kunnu nevnast Coca-Cola, Aker Kværner, Den Danske Bank, Ericsson og SAS.

Profiles International er ein av fleiri nokk so líkum fyritøkum, sum hava brúkt HR-menningaramboð til tess at lýsa eginleikar og motivasjónir hjá fólki. Fleiri av hesum HR-fyritøkunum hava leingi brúkt kliniskar testir av førleikunum hjá starvsfólkunum.

Við slíkum royndum ber til at raka nokk so beint - úr einum 16 til 35 prosent vissu fyri, at ein umsøkjari til dømis er tann rætti til lýsta starvið. Her tosa vit mest um starvsfólkasetanir, har fólk eisini skulu svara spurningum um teirra eginleikar, fortíð og persónsmensku.

Seinnu árini hava granskarar gjørt nógv burtur úr at útgreina hvørjar týpur eru á einum arbeiðsplássi og hvat tað er, sum ger at fólk trívast og fáa nakað á skaftið.

Profiles International hevur brúkt hesa gransking og er farið nøkur stig longur og velur eitt nú mental evnir og motivasjónsgrundarlag saman við øðrum framkomnum greiningum til tess at fáa eina mynd av, hvør sessur hóskar best til tín.

- Vit eru komin so langt í dag, at óvissan um rætta persónin gerst lítil. Og øll fáa ágóðan: Samfelagið, privata fyritøkan, almenni stovnurin og ikki minst persónurin. Vit hava lagt okkum eftir at fáa úrslit, sum síggjast. Og staðfestingin av, at framferðarhátturin hjá okkum virkar, hevur gjørt Profiles International til skjótast vaksandi fyritøku av sínum slag, sigur Finn-Roger Nikolaisen.

### FLEIRI TILBOÐ

Profiles International brúkar ymisk amboð til tess at lýsa eginleikarnar hjá starvsfólki. Eitt tað mest vanliga er testin, sum verður brúkt tá ein fyritøka ella ein stovnur skulu seta nýggj fólk í starv. Hetta verður nevnt ProfileXT og amboðið kann brúkast langt inn í sjálva setanartilgongdina, har ivi er um ein ella fleiri umsøkjarar.

Eisini kann XT brúkast til tess at lýsa, hvussu menniskjaliga tilfeingið á arbeiðsplássinum er sett saman. Á tann hátt ber til at fáa rætta persónin til rætta starvið. Amboðið verður somuleiðis brúkt at flyta fólk fram ella í sjálvari leiðsluni.

Finn-Roger Nikolaisen sigur, at við vanligari starvsfólkasamrøðu er bara 16 prosent møguleiki fyri, at persónurin hóskar til starvið, meðan víðkaða Profile XT testin økir møguleikan upp í 75 prosent.

Okkurt av amboðunum leggur seg mest eftir at finna røttu sølufólkini, í øðrum førum snýr tað seg um at finna serligu eginleikarnar til kundarøkt í t.d. einum peningastovni og eitt annað amboð verður brúkt til at finna røttu vinnararnar ella toppleiðararnar.

- Í Norðurlondum eru hesi amboðini tí ófrávíkilig í starvsfólkapolitikkinum, bæði á privata og á almenna arbeiðsmarknaðinum, sigur Finn-Roger Nikolaisen.

Hann minnir á, at tá fólk rýma av einum arbeiðsplássi, so rýma tey ikki frá fyritøkuni, deildini ella stovninum. Tey rýma undan fólkum, og oftast endar nissan hjá leiðsluni. Eru leiðararnir góðir, gevur tað góð úrslit. Eru teir vánaligir, flýggja fólk yvir háls og herðar.

Finn-Roger vísir eisini á, at um allan knøttin er vánalig kundatænasta orsøk til, at tveir triðingar av kundunum rýma.

### VEL RØTTU ÚTBÚGVINGINA

Men um tað er soleiðis, at vissan fyri, hvat tú ert best egnaður til, næstan er líka stór, sum ein gentest ella ein blóðtýpa, hví so ikki gera eina slíka test, áðrenn tú fert undir útbúgving?

- Góður spurningur, heldur norski Profiles umboðsmaðurin, men hann fær ikki sagt meira, tí føroyski umboðsmaðurin fyri Profiles International, Djóni Dalsgarð, brýtur hann av við einum dømi úr sínum egna lívi.

- Eg eri til dømis útbúgvin lærari, men tá eg testaði meg upp móti teimum virðum og eginleikum, sum ein góður lærari eigur at hava, so dumpaði eg so dyggiliga.



Djóni Dalsgarð, sum umboðar Profiles International í Føroyum, hevur sum starvsfólkaleiðari verið við til at seta fleiri hundrað fólk í starv eftir amboðunum hjá fyritøkuni.

Eftirmæli frá flestu næmingunum hjá mær siga kortini, at eg var ein góður lærari, men tað komst av, at eg legði alla orku í at fáa nakað burturúr.

- Eg gavst skjótt sum lærari í fólkaskúlanum, men áðrenn eg byrjaði læraraútbúgvingina, kundi ein test havt víst mær, at mínir eginleikar og mín motivasjón liggja aðrastaðni, sigur Djóni Dalsgarð.